# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*-Nú fáa vit so síggja, hvussu leikur fer, sigur stjórin á Jarðfeingi, sum eisini fegnast um, at teir loksins fingu avtaluna uppá pláss við Statoil og hini oljufeløgini.*

# Jarðfeingi fylgir boring við stórum spenningi

*Stena Don lá á Nólsoyarfirði í tveir dagar, áðrenn kósin varð sett á Brugdumiðið.*



*Mynd Árni C*

**-Tað er at fegnast um, at tað eydnaðist Statoil at fáa ein boripall longu tíðliga í summar. Nú mugu vit so síggja, hvussu leikur fer sigur stjórin á Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu**

**BRUGDUBORING**

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Á middegi mikudagin var borurin loksins settur í Brugdumiðið úti á Suðuroyarbanka. Eftir drúgva fyrireiking kundi ovasti leiðarin fyri hesi stóru verkætlan geva sínum fólkum grønt ljós at seta borin í ella sum tað verður kallað á borimáli "Spud".

Sum skilst hevur gingið væl í hond og nú verður so borað niður á 3800 metrar. Dýpið, har borað verður, er 480 metrar. Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi er fegin um, at tað eydnaðist at fáa fatur á einum boripalli longu nú, tí tað er so umráðandi at koma í gongd, áðrenn tað líður ov nógv út á árið.

-Vit fara av fylgja boringini við stórum spenningi og vónandi hava vit eitt úrslit at leggja fram fyri almenningin um einar tríggjar mánaðir. Gongst væl at bora so kanska fyrr enn tað sigur Sigurð í Jákupsstovu. Frá nú av verða tíðindini frá boringini bara at frætta frá Jarðfeingi, sum fær allar upplýsingar frá Statoil. Av tí at boringin hevur „tight hole" status verða eingir upplýsingar latnir frá oljufeløgunum næstu tríggjar mánaðirnar.

Hóast stórur áhugi er fyri boringini og at mong bíða spent til í oktober at frætta nærri, so er greitt, at tað fæst einki endaligt úrslit tá. Rúni M. Hansen segði við Sosialin nú um dagarnar, at gera teir eitt fund tvs. raka teir við kolvetni, so verður brunnurin kortini ikki testaður fyrr enn í 2008. Tú testar brunn fyri at vita, hvussu stórt eitt fund er og um tað er rakstrarverdugt. Við útvarpið í gjár segði Rúni M. Hansen, at upplýsingarnar, sum koma frá boringini í vetur, fara ikki at siga okkum, um talan er um eitt lønandi fund. Tað fer at siga okkum, um tey hava rakt við olju, men ikki hvussu nógva. Tað mugu vit bíða við at fáa meira at vita um til í 2008, tá og um avmarkingarbrunnar verða boraðir segði hann við útvarpið. Tað er tó greitt at boringin longu í vetur kann geva okkum týðandi upplýsingar um t.d. kvalitet á olju o.a.

-Nú fáa vit so síggja, hvussu leikur fer, sigur stjórin á Jarðfeingi, sum eisini fegnast um, at teir loksins fingu avtaluna uppá pláss við Statoil og hini oljufeløgini.

Talan er um tveir brunnar, sum eru lagdir saman í ein. Ein hjá Statoil sum fyristøðufelag og ein hjá Amerada Hess sum fyristøðufelag. Feløgini mettu tað vera skilabetri at flyta hesi boriforpliktilsini til eitt annað øki og tað bleiv so á basaltinum, har tað ikki er borað áður. Tí er júst henda boringin rættiliga einastandandi og kolveltandi.

Mett verður at øll boriverkætlanin fer at kosta eina hálva milliard kr. Men harfyri er einki givið. Metingin sigur, at tað eru 23% møguleiki fyri at gera eitt fund.

Boringin á landrunninum, sum nú er í gongd, er tann fyrsta, síðani at Jarðfrøðissavnið og Oljufyrisitingin vórðu samanløgd í ein felags stovn við heitinum Jarðfeingi.

## Fólkatónleikarstevnan byrjar við dansikvøldi

**FÓLKATÓNLEIKUR**

Mikukvøldið 19. juli kl. 20 byrjar Fólkatónleikarstevnan 2006 við einum fólkadansikvøldi í Bygdarhúsinum í Hósvík

Fýra orkestur eru á skránni: Spælimenninir og Hilmar Joensen úr Føroyum, Valseværket úr Danmark, Skrå úr Álandi og Valravn úr Danmark/Føroyum. Sharon Weiss og onnur skipa fyri léttari dansivegleiðing, og tónleikarar spæla vals, reinlendara, polka og annað gott, so øll dansiáhugað kunnu fáa sær ein "svingom". Eisini fara tónleikarar úr Valravn at instruera nakrar fólkadansir úr miðøldini, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Hetta er fyrstu ferð, roynt verður at skipa fyri einum slíkum fólkadansikvøldi sum partur av Fólkatónleikastevnuni, og fyrireikararnir vóna, at hetta verður ein fastur táttur komandi árini.

Fólkatónleikarstevnan heldur fram við konsertum hóskvøldið 20. juli í Fugloy, 21. juli og 22. juli í samstarvi við G! festivalin í Gøtu og í Runavík, og sunnudagin 23. juli í Norðurlandahúsinum. Fólkatónleikarstevnan endar, sum siður er, við konsert mánakvøldið 24. juli í Mykinesi.




# Sláa ring í Øravík leygarkvøldið

**Hetta vikuskiftið verður árliga dansináttin í Øravík við borðhaldi, felagssangi og føroyskum dansi alla náttina**

Ì fleiri ár hava dansifeløgini í Suðuroy skipað fyri eini árligari dansinátt saman við hotellinum í Øravík.

Og nú er so komið hartil, at tað er nú leygarkvøldið 15. juli, at hetta tiltakið verður í Øravík.

Uni Mortensen sigur, at dansináttin plagar at vera í august, men í ár er hon rykt ein mánað fram.

Hann sigur at borðhaldið byrjar klokkan 19.30 við sjálvtøkuborðið við heitum mati, har ymisk sløg av kjøti og ymisk sløg av eplum verða at velja ímillum.

Aftaná er so dansur alla náttina.

Hetta plagar at vera eitt sera væleydnað tiltak, har eisini dansifólk norðaneftir plaga at koma.

Men fyri at vita, hvussu nógv fólk kemur, er neyðugt at tekna seg og tað kann gerast hjá dansifeløgunum í Suðuroy ella á hotellinum sjálvum. Og tað skal gerast í seinasta lagi á miðdegi fríggjadagin.

Alt tiltakið kostar 180 krónur, men hjá teimum, sum bara koma til dansin, kostar tað 50 krónur.